## Svanapar við ungum

Ikki er óvanligt, at svanir steðga á Niðri á Vatni, men meiri sjáldsamt er tað, at eitt svanapar reiðrast á hesum staði. Í seinastuni hava eiðisfólk og onnur vitjandi eygleitt, hvussu bøgan hevur ligið á eggum, og leygardagin kundu fólk við frøi – og frøði – staðfesta, at svanaparið hevði ríkað djóralívið við tveimum ungum. Í dag ber til at síggja hesar ungarnar, væl vardir av foreldrum sínum, svimja aftur og fram á vatninum. – Einki er at siga til, at henda søguliga hending og vakra sjón vekir ans millum fólk á Eiði og helst aðrastaðni við, skrivar heimasíðan hjá Eiðis kommuna.



## Arbeiða víðari við Kambodja-ætlanini

Høvuðsstýrið hjá Heimamissiónini hevur tikið avgerð um, at arbeiðast skal víðari við asiatiska landinum Kambodja sum nýtt fokusøki fyri útimissión. Tørvur fyri evangeliserandi arbeiði er til staðar í landinum, og við hesi avgerðini hevur Heimamissiónin tikið eitt stig víðari í hesi tilgongdina. – Nógv skal gerast, áðrenn nakar kann sendast út. Vit hava tosað við norðurlendskar missiónsfelagsskapir, og teir siga, at tað tekur eitt til tvey ár, áðrenn nakar kann fara út. Vit meta tað verða neyðugt at vera væl fyrireikað, og tí má tað taka sína tíð, sigur Thomas Dam, formaður í høvuðsstýrinum Nógv arbeiði skal kortini gerast, áðrenn fyrsti trúboðarin kann sendast hagar – kanska 1-2 ár.

# Tónleikur í 1000 ár



*Tróndadagar eru í Gøtu*
*Mynd: Jan Müller*

Hvussu mundi norðurlendski tónleikapallurin síggja út fyri 1000 árum síðani? Hendan spurning fer norðmaðurin Odd Sylvarnes at viðgera í Valhøll í Syðrugøtu í kvøld klokkan 20.

Í samband við, at Tróndardagar eru í Gøtu, verður í kvøld skipað fyri tónleikaseminari í Syðrugøtu undir heitinum "Tónleikur fyri 1000 árum síðari".

Norðmaðurin Odd Sylvarnes Lund vitjar í hesum døgum oyggjarnar, og framførdi á konsertini í Gøtu kirkju leygarkvøldið á sínum sermerktu ljóðførum verk frá fleiri ymiskum tíðarskeiðum. Í kvøld leggur hann fyri og greiðir frá sínum hugsanum um eldri norðurlendskan tónleik.

Odd virkar partvís sum professari á Norges Musikkhøgskole í Oslo og partvís sum fólkatónleikari. Hann hevur ognað sær serkunnleika í gomlum norskum ljóðførum so sum lúðuri, bukkhorni og munnhørpu. Við hesum ljóðførum hevur hann ferðast víða um við sínum tónleiki og hevur millum annað roynt seg saman við Berlinar philharmonikarunum og setti olympiaduna í Lillehammer.

Seminarið verður í kvøld klokkan 20 og er ókeypis.

# Friðarligt vikuskifti

**Hóast stevna hevur verið bæði í Miðvági og á Sandi, hevur vikuskiftið verið friðarligt. Okkurt ferðsluóhapp, stuldur og eitt kollektivt neytasjálvmorð eru tað mest merkisverda.**

LØGREGLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú stevna hevur verið bæði í Miðvági og á Sandi, hevur løgreglan í Havn ikki havt tað stóra at gjørt. Ein maður varð koyrur úr Vágunum til Havnar at sova rúsin av sær leygarnáttina. Sunnudagin klokkan 16.10 fekk løgreglan boð um, at eitt neyt var omandottið av einum hamri við Sundsverkið. Tá løgregla og djóralækni vóru komin á staðið, leyp eitt annað neyt, ið enn stóð uppi á hamrinum oman, og stutt eftir leyp tað triðja eisini oman. Hví hesi trý neytini valdu at stoyta seg omanav, er ilt at gita um.

Sunnukvøldið klokkan 23.30 fekk varð løgreglan boðsend til Keypssamtøkuna í Hoyvík, har onkur hevði stolið 20 kartengur av sigarettum, nakrar pakkar av rullitubbaki og 1200 krónur í vekslipengum.

Í Klaksvík varð eitt ferðsluóhapp norðuri á Stongum leygarmorgunin um klokkan trý, har ein ungur maður rendi á ein garð. Hesin er nú skuldsettur fyri spirituskoyring. Eitt annað lítið ferðsluóhapp hevur verið, ein sokallaður parkeringsskaði. Harafturat hevði onkur maður, ið var á veg heim úr býnum, vakt okkurt húsið, og har var løgreglan so boðsend.

Hóast stevna hevur verið í Húsavík, hevur vikuskiftið verið stak friðarligt hjá løgregluni í Sandoynni. Á Tvøroyri var ein maður tikin fyri at sigla rúsdrekkaávirkaður á Trongisvágsfirði. Hetta er brot á sjólógina og verður sektað við bót. Harumframt vóru tveir ungir mans skuldsettir fyri rúsdrekkakoyring, annar leygarnáttina um klokkan tvey, og hin sunnumorgunin um klokkan átta, upplýsir løgreglan.

Vestanstevna hevur verið í Vágunum, og har hevur okkurt smávegis verið. Fríggjanáttina varð ein rútur varð knústur á politistøðini í Miðvági, og tveir mans vóru farnir til henndurs uttanfyri MB-húsið. Eisini vóru fýra fullar damur farnar at skeldast nakað illa, og løgreglan mátti skilja tær sundur. Herverk varð eisini framt á ein bil, ið stóð uttanfyri Mylluna. Gerningsmaðurin er funnin í hesum málinum. Leygarnáttin var meira friðarlig. Onkur ósemja, har nevar vóru á lofti, mátti greiðast, og fleiri vóru sovnaði úti. Ein maður var somikið niðurkøldur, at hann varð sendur á Landssjúkrahúsið til víðari kanningar.

Samanumtikið eitt friðarligt vikuskifti, hóast nógv fólk hevur verið úti, upplýsir løgreglan.